# Tjóðveldi í politikki –

**Teir vísu menninir í undirhúsinum í Leirvík ynskja bara løgtingsvalið yvistaðið sum skjótast. Teir gleða seg nógv meiri til fyrsta dystin í Formuladeildini tann 29. mars – helst heimadyst í Gøtu ímóti B68**

*Tað sum ein sigur í Tjóðveldinum, kann ein sambandsmaður eisini siga, og tað sum ein fólkafloksmaður skrivar kundi ein javnaðarmaður eins væl havt skrivað*

LØGTINGSVAL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

**Statoil-støðin, Leirvík:** Tað er kalt í veðrinum henda fyrrapartin her uttarlaga í bygdini.

Klokkan er ikki farin nógvar minuttir av hálvgum tíggju í henda týsmorgunin, tá teir fyrst menninir koma til ein drekkamunn á kaffistovuni á Statoil-støðini í bygdini. Her verða mong skilaorðini søgd og viðmerkt.

Teir skunda sær inn í hitan, tí tað er so bítandi kalt í veðrinum fyriuttan. Eitt grovt æl er á veg, og tað ræður um at sleppa sær inn áðrenn ælið freka kemur framvið.

So líðandi fyllist upp við borðini í kaffistovuni og prátið byrjar so spakuliga. Menn koma og fara, men eingin ivi er um, at hetta er ein løta sum teir síggja fram til hvønn einasta dag. Á skránni henda týsmorgunin er eitt høvuðsevni, og tað ræður um at vita, hvat hinir halda um tað.

Teir vita av royndum, hvat teir skulu keypa og hvat teir í roynd og veru koma higar eftir. Tað sama ger tann fryntliga kvinnan, ið fyrrapart eftir fyrrapart setur kaffi fram fyri teir, smyr rundstykkini og ger wienarbreyðini klár.

Sum oftast fáa teir frið at práta við hvønn annan, tí tað er ikki hvønn dag at fremmand fólk eru til kaffi hesa løtuna.

Evnini, tey kunnu vera so ymisk – frá kommunusamanlegging, útróðri, politikki og víðari til onnur viðkomandi evni. Í dag er kortini bert eittans evni á skránni: Fótbóltur!

## Tey trý stigini

Fyrrapartin ígjár vórðu teir kortini "órógvaðir" av tíðindafólki og myndamanni frá Sosialinum. Men hetta tóktist kortini ikki bila tað einasta petti.

12 tímar frammanundan var ein rættilig kollvelting farin fram í bygdini og í grannabygdini Gøtu. Hetta kvøldið sá eitt nýtt føroyskt fótbóltsfelag dagsins ljós, nevniliga tað samanlagda GÍ/LÍF.

Henda avgerðin skuggaði fyri øllum tí politiska tjakinum og orðaskiftinum í seinastuni. Ein politiskur tjakfundur millum floksformenninar úr Kambsdali, sum varð sendur beinleiðis á Rás 2 henda fyrrapartin, hevði ongan áhuga teirra millum.

Tann rundi bólturin og tey trý stigini sum eru at stríðast fyri til hvønn dyst, var høvuðsmálið við henda kaffisteðgin.

Framtíðin hjá fótbóltinum í Leirvík og Gøtu hevði helst nógv størri áhuga enn framtíðin hjá Føroya landi!

## Munur á fótbólti og politikki

Fleiri teirra vóru á fundinum kvøldið fyri, har ætlaða samanleggingin av LÍF og GÍ gjørdist veruleiki. Á fundinum í Leirvík vóru 56 fólk og fyri hesi fólkini var eingin ivi: Øll 56 atkvøddu nevniliga fyri, at feløgini verða løgd saman.

- Eg skilji ikki rættiliga, at nakar kann vera ímóti tí. Hygg bara eftir teimum í Gøtu – har var gott nokk ein sera stórur meiriluti fyri eini samanlegging.

- Men tað løgna var, at tað kortini vóru 12 sum vóru beinleiðis ímóti hesum uppskotinum og tvey sum ikki vildu siga sína hugsan og tí atkvøddu blankt.

- Ja, eg spyrji bara: Hvat í ólukkan munnu tey hava ímóti okkum?, sigur ein av hesum skilamonnunum.

Politiska telvingin um samband og loysing er eisini eitt av evnunum, sum tikið verður fram við borðið. Men meiningarnar eru sera ymiskar:

- Eg skilji so púrt einki av tí heila, sigur ein yngri maður. – Síggja tit, ein av teimum mest ivrigu tjóðveldismonnunum í allari bygdini, hann atkvøddi fyri at vit skuldu leggja saman við GÍ.

- Tja, kanska er tað bara eg sum ikki rættiliga havi skilt munin á fótbólti og politikki. Løgið er tað í øllum førum, at hann kann vera tjóðveldismaður í politikki





*Teir vísu menninir duga væl at lurta og eru heldur ikki bangnir fyri at siga sína erligu hugsan um dagsins mál, og tá er líkamikið um tað er innan politikk ella fótbólt. – Eg skilji bara ikki, hví teir ikki beinanvegin boraðu tunnilin til Gøtu. Tað hevði gott nokk kostað eitt sindur meiri, men hevði spart okkum fyri nógvum stríði og tjaki!*

*Eg skilji ikki, hví Fríðgerð krógvar seg soleiðis burtur. Tað behøvdist hon ikki gera. Er hin pen, so er Fríðgerð tað so sanniliga eisini!*